# Hans Jacob og Arnbjørn fóru við sigrinum

**Hans Jacob og Arnbjørn vunnu Føroya Tele Cup í bridge um vikuskiftið við einum sera góðum endaspurti, tá teir tóku seg framum oddafiskarnar**

BRIDGE
*Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen*

Hans Jacob Petersen og Arnbjørn Sivertsen vunnu Føroya Tele Cup við einum góðum endaspurti. Tað mesta av kappingini høvdu Per Kallsberg og Dánjal Pauli Mohr ligið fremstir við Robert Langgaard og Eyðuni Anthoniussen í hølinum, men í allar seinasta umfari eydnaðist Hans Jacob og Arnbjørn at smoyggja sær framum, tá tey bæði fremru pørini spældu javnt móti hvør øðrum.

Føroya Tele Cup er ein liður í royndunum hjá landsliðunum, sum skulu til EM í summar, at fáa fígging til luttøkuna. Tiltakið eydnaðist stak væl og gav eitt gott íkast til EM liðini. 22 pør spældu við og fingu eina vælskipaða og spennandi kapping, sum á allan hátt stóð mát við aðrar slíkar kappingar uttanlands. Kappingarhátturin, ið nýttur var, kallast Swiss Pairs. Spæld vóru 60 spøl (12 umfør á 5 spøl), og millum hvørt umfar fingu leikarar barometeruppgerð við øllum spølunum frá fyrra umfarinum á. Avgjørt ein service, sum fall í góða jørð hjá leikarunum. Skulu vit seta fingurin á nakað, so var tað, at ov ofta hittust tey somu pørini í fylgjandi umførum.

### Føroya Tele Cup — endaligt úrslit

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Arnbjørn Sivertsen — Hans Jacob Petersen | 695 |
| 2 | Robert Langgaard — Eyðun Anthoniussen | 686 |
| 3 | Per Kallsberg — Dánjal Pauli Mohr | 680 |
| 4 | Magni Jøkladal — Árant Berjastein | 663 |
| 5 | Niels Nielsen — Bjarki Johannesen | 623 |
| 6 | Oddmar Danielsen — Einar Ellingsgaard | 622 |
| 7 | Zakarias Joensen — Salomon Johansen | 618 |
| 8 | Hallberg Arnfríðsson — Kaj Alstrup | 616 |
| 9 | Jógvan Juel Rasmussen — Allan Dal-Christiansen | 603 |
| 10 | Danny Danielsen — Ann Thomsen | 599 |
| 11 | Hannis Jacobsen — Súsanna Dam | 590 |
| 12 | Hans Egil Joensen — Edmund Joensen | 589 |
| | Eyðbjartur Danielsen — Hanus Bærentsen | 589 |
| 14 | Laila Danielsen — Maria Christiansen | 583 |
| 15 | Hallur Ellingsgaard — Eirikur Joensen | 581 |
| 16 | Jórun Johannesen — Marjun Restorff | 576 |
| 17 | Eyðun Joensen — Pól Joensen | 575 |
| 18 | Jan Petersen — Øssur Winthereig | 574 |
| 19 | Eyðun Olsen — Ingolf Olsen | 549 |
| 20 | Haldor Ellingsgaard — Jóannes Sólheim | 542 |
| 21 | Jens Pauli G. Nolsøe — Høgni Hansen | 527 |
| 22 | Kristina Ottosdóttir — Andras Róin | 514 |

Her skulu vit síggja nøkur spøl frá Føroya Tele Cup. Vit sita til borðs saman við vinnararunum av kappingini.

### Spennandi klípingar — "Først den ene vej...."

```
Spil  16    S  K8
V/EV         p  K872
            Hj A74
            R  AJ98
             ú
            K
             l
S  AJ1095    N     S  642
 p  3       V   E   p  Q10953
Hj J4        S     Hj 1065
R  K               R  53
 ú  KQ106           ú
K                  K
 l                  l
            S  Q7
             p  A6
            Hj QJ9832
            R  742
             ú
            K
             l

   V          N          E          S
  Eyðun     Hans J     Robert    Arnbjørn
Anthonius  Peterse:   Langgaar  Sivertse
   sen
  1sp        D         pass      3ru
  pass      3ut        pass      pass
  pass
```

Eystan spældi sp 6 út til 7, 9 og K. Spaðarahaldið var burtur, og nú skuldi alt gerast rætt í rútara. Hans Jacob fór út á borðið uppá hj A, spældi ru Q, kongurin kom á, og essið tók stikkið. Tá hann spældi rútara aftur, blivu tíggjuni hjá Eystan klípt út. Tvey onnur pør fingu eisini 10 stikk í 3ut, og spælið gav NS +8 á barometrinum av 10 møguligum.

### Sperrimeld og Lebensohl

```
Spil  nr  2Ʒ  S  AK9
S/-            p  J1064
              Hj A965
              R  83
               ú
              K
               l
S  63          N       S  J54
 p  AK52      V   E     p  Q93
Hj J104        S       Hj Q82
R  KQ109               R  6542
 ú                      ú
K                      K
 l                      l
              S  Q10872
               p  87
              Hj K73
              R  AJ7
               ú
              K
               l

   V          N          E          S
Arnbjør      Per      Hans J     Dánjal I
Siverts·   Kallsber   Peterse:     Mohr
   -          -          -         2sp
   D         pass       2ut        pass
  3kl        pass       pass       pass
```

Øll vita, hvønn týdning góðar bremsur hava, tá ið vit eru úti í ferðsluni. Tað sama er galdandi í bridge, ikki minst tá ið mótparturin ger ferðsluna ótrygga við einari sperrimelding.

Ein verjuskipan móti sperrimeldingum er Lebensohl. Í hesum spælinum síggja vit eitt dømi um, hvussu Lebensohl skipanin hjálpir okkum at støðga, meðan væl er.

Sunnan sperrar 2sp, sum kann vera 5 ella 6 litur og sera veikt. Hetta er orsøkin til, at Norðan her er so passivur. Vestan upplýsingarduplar. Eystan hevur eina veika hond og vísir hetta við at svara 2ut til duplingina. Meldið biður makkaran melda 3kl og síðan pass, um nýggjur litur verður meldaður.

Fleiri EV komu ov høgt í hesum spælinum, uttan iva tí tey ikki nýta Lebensohl. Kontraktin 3kl fór tveir niður, 100 til NS. Spælið gav EV +9 á barometrinum. Fleiri NS sluppu at vinna eina spaðarakontrakt við 9 ella 10 stikkum.

### FM pør finala

FM finalan fyri pør verður leygardagin 20. apríl í Bridgehúsinum í Havn. Byrjað verður at spæla kl 10.00 fyrrapartin. 20 pør eru við í finaluni, og tey skulu spæla 57 spøl, áðrenn vit hava funnið føroyameistararnar fyri í ár.



*Arnbjørn Sivertsen og Hans Jacob Petersen vunnu Føroya Tele Cup um vikuskiftið við 695 stigum*



*Robert Langgaard og Eyðun Anthoniussen gjørdust júst ov stuttir við 685 stigum*



*Per Kallsberg og Dánjal Pauli Mohr vóru eisini heiðraðir, eftir at teir endaði á triðja plássi við 680 stigum*

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg



# Hallur og Katrin vunnu

**Tað vóru Hallur Stakksund og Katrin Sørensen, ið gjørdust vinnarar av næstu duathlonkappingini, sum Føroya Triahtlon Felag skipaði fyri í góðveðrinum sunnudagin**

**Tíðindaskriv:**

Duathlon er samansett at greinunum svimjing og renning. Íðkarin skal fyrst svimja ein ávísan tein, skunda sær at skifta í renniklæðir og síðani renna ein ávísan tein.

Fyri góðum mánaði síðan skipaði FTF fyri fyrstu kappingini í ár. Tá vann Bogi Lenvig kappingina hjá monnum og Rannvá Jacobsen kvinnum.

Bogi luttók ikki sunnudagin, og tí var spenningur um hvussu leikur fór. Hallur gjørdist nr. tvey seinast og tí var hann favorittur.

Luttakararnir skuldu fyst svimja 750 metrar og síðan renna 5 km. Svomið var í Svimjihylinum í Gundadali, og luttakararnir skuldu síðan skunda sær í renniskógvarnar og út at renna. Leiðin gekk oman eftir Ringvegnum, Yvir við Strond har vent varð nakað sunnanfyri Tórgarðsgøtu. Leiðin gekk síðan niðan aftur til Svimjihylin har málið var.

Hallur legði hart út, og hann var eisini fyrstur úr hylinum. Eli Christiansen var eisini væl við, og kom úr hylinum stutt eftir Hallur. Men Hallur rann væl og tá avtornaði vann hann meir enn einum minutti.

Í fyrru kappingini var Rannvá Jacobsen einsamøll kvinna. Men hesa ferð vóru fleiri um boðið, og nú fekk hon harða kapping frá Katrin Sørensen. Báðar eru tær fyrrverandi landsliðssvimjarar, og tær komu tí báðar nærum samstundis úr hylinum. Katrin rann væl og tað øktist tí skjótt millum tær báðar, og tá avtornaði vann Katrin ein tryggan sigur – meira enn tríggir minuttir vóru millum nr. 1 og 2.

Næsta kapping, ið FTF skipar fyri verður 12. mai. Tá verður kappast í Triathlon, har svomið verður 750 metrar, súkklað 20 km og runnið 5 km.



*Eli Christiansen gjørdist nr. 2 í Duathlon klappingini*

| Menn | Tíð | Stig |
|---|---|---|
| 1. Hallur Stakksund | 32 min. 24 sekund | 40 |
| 2. Eli Christiansen | 33,39 | 36 |
| 3. Gunnar Dahl-Olsen | 34,52 | 30 |
| **Kvinnur** | **Tíð** | **Stig** |
| 4. Katrin Sørensen | 36 min. 11 sekund | 40 |
| 5. Rannvá Jacobsen | 39,37 | 36 |
| 6. Annika Jacobsen | 43,23 | 30 |
| 7. Brynhild Klein | 45,09 | 26 |

**Samlaða støðan eftir tvey umfør:**

| Menn | Stig |
|---|---|
| 1. Hallur Stakksund | 74 |
| 2. Eli Christiansen | 60 |
| 3. Gunnar Dahl-Olsen | 53 |
| 4. Bogi Lenvig | 40 |
| 5. Dia Jacobsen | 20 |
| 7. Kári Simonsen | 18 |
| **Kvinnur** | **Stig** |
| 8. Rannvá Jacobsen | 74 |
| 9. Katrin Sørensen | 40 |
| 10. Annika Jacobsen | 30 |
| 11. Brynhild Klein | 26 |



## Hvar er bólturin?




Tað er ikki loyvt at kopiera henda lepe

Navn: ..........
Bústaður: ..........
Tlf: ..........
Eg giti, at bólturin er í teigi: ..........

Seðilin skal sendast til:
Sosialurin, postsmoga 76, 110 Tórshavn.
Merkið brævbjálvan "FCK"

**Gitið, hvar bólturin er, og vinnið eina ferð til stórdystin millum FCK og Brøndby**

12. mai í ár verður stórdystur í Danmark. FCK tekur tá ímóti Brøndby, og longu nú er líkt til, at hetta verður dysturin, sum ger av, hvar DM-gullið skal fara í ár.
Sum kunnugt skipa Atlantic Airways og Sosialurin fyri ferð til Keypmannahavnar í samband við dystin, og nú ber til hjá onkrum hepnum lesara at vinna sær pláss á hesi ferð.

Tað ræður snøgt sagt um at gita, hvar bólturin eigur at vera á myndini. Skrivað á lepan, í hvørjum teigi tú heldur bólturin eigur at vera, og send síðani lepan til okkara. Allir lepar við rætta svarinum verða latnir í ein pott, og hin 27. apríl fara vit at kunngera, hvør hepni vinnarin er. Um so er, at hesin longu hevur keypt sær ferðaseðil til dystin, ber sjálvandi til at fáa hendan endurgoldnan. Kappingin verður í blaðnum til og við 23. apríl. Minnist til. Jú fleiri lepar tit senda inn, størri er møguleikin fyri at gerast hepni vinnarin.

Sosialurin
ATLANTIC AIRWAYS